FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 25. okkober 2024
J.nr.: 24/24008
Viðgjørt: EC

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-038/2024 frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um Búskapargrunn Føroya.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Vórðu fleiri pengar fluttir í Búskapargrunn Føroya í 2022 enn tað, sum lógin kravdi?

2. Eru fleiri pengar fluttir í Búskapargrunn Føroya í 2023 enn tað, sum lógin krevur?

3. Hava undanfarin landsstýri goldið minni inn í Búskapargrunn Føroya enn tað, sum lógin kravdi?

Svar
Inntøkur frá tilfeingisgjøldum eru fluttar millum fíggjarlógina og Búskapargrunnin sambært galdandi lóg.

Búskapargrunnurin hevur tvey høvuðsmál. At javna tilfeingisinntøkur yvir ár og at seta serligar inntøkur til síðis í grunnin sum ein ávís uppsparing. Talvan vísir útjavningar og uppsparingar í grunninum.

Búskapargrunnurin	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**	**2022**	**2023**
Inntøkur, § 2								
Stk. 2, nr. 1) Avlop á RLÚ I		221,7	76,0	154,0		27,5	38,9	
Stk. 2, nr. 2) Einskiljing	23,3							
Stk. 2, nr. 3) Flyting		93,0				21,3		
Stk. 2, nr. 4) Íløgurøkt		1,0	-4,9	28,1	13,2	28,4	-78,2	68,7
Stk. 2, nr. 5) Fiskivinna			303,3	369,3	293,8	314,1	380,2	502,5
Stk. 2, nr. 6) Alivinna			136,4	140,0	81,8	196,2	284,2	213,1
	23,3	**315,8**	**510,7**	**691,4**	**388,8**	**587,4**	**625,1**	**784,3**
Útgjøld, § 3								
Stk. 2) Serinntøkur *)		-2,3						
Stk. 2) Fiskivinna			-257,6	-274,7	-280,9	-290,1	-308,7	-344,7
Stk. 3) Alivinna			-136,4	-140,0	-81,8	-156,6	-175,8	-184,8
		-2,3	**-394,0**	**-414,7**	**-362,7**	**-446,7**	**-484,4**	**-529,5**
Tilsamans	**23,3**	**313,4**	**116,7**	**276,7**	**26,1**	**140,8**	**140,7**	**254,8**

**) Ásetingin varð sett úr gildi við løgtingslóg nr. 46 frá 30. apríl 2018.*

Saldan í Búskapargrunninum er netto 1.292,6 mió. kr. við ársbyrjan 2024. Støðisfæið (uppsparingin) er 709,8 mió. kr., og javningarupphæddin er 582,8 mió. kr.

Uppsetingin í fíggjarlógini alstóran týdning fyri, hvussu flytingarnar millum fíggjarlógina og grunnin verða fataðar og viðgjørdar politiskt.

Tinganes, 25. oktober 2024

Ruth Vang
landsstýriskvinna í fíggjarmálum